# Trý spennandi størv í Eik Banka

Vit søknast eftir leiðara til Vinnulívsdeildina og tveimum starvsfólkum til Fíggjardeildina í Havn



Eik

## Leiðari til Vinnulívsdeildina

**Avbjóðingin**
Vit søknast eftir virkisfýsnum leiðara at taka við ábyrgdini av nýsamanløgdu vinnulívsdeildum okkara í Havn og Saltangará. Alt virksemið verður nú savnað í Havn, og sum vinnulívsleiðari verður tín fremsta uppgáva at leiða og menna Vinnulívsdeildina og tryggja, at deildin liggur á odda í lønsemi og hevur mest nøgdu kundarnar.

Virksemið á Vinnulívsdeildini fevnir um fíggjarligar heildarloysnir fyri allar okkara vinnulívskundar kring landið. Harafturat arbeiðir deildin eisini við virksemi uttanlands.

18 fólk starvast á Vinnulívsdeildini, og tú fært ábyrgd av einum dugnaligum toymi av starvsfólki. Starvið fevnir tí eisini um starvsfólkarøkt og samskipan av arbeiðnum, sum skal tryggja, at toymið virkar til fulnar, soleiðis at Vinnulívsdeildin til eina og hvørja tíð er kappingarfør og framfýsin. Talan er um eitt krevjandi starv, ið krevur áræði og orku, og leita vit tí eftir einum persóni, ið hevur hesar førleikar og eginleikar:

**Fakligir førleikar**
- Tú hevur viðkomandi útbúgving, eitt nú cand. merc, cand. oecon, HD ella líknandi og/ella hollan kunnleika til ella royndir úr bankayrkinum
- Tú hevur royndir innan leiðslu ella ynski um at verða leiðari
- Tú hevur innlit í vinnulív, roknskap og búskap
- Tú hevur góðar málsligar førleikar, og dugir væl enskt í skrift og talu

**Persónligir eginleikar**
- Tú hevur handilsligan hugburð og eyga fyri góðari forrætning
- Tú ert jarðbundin, men eisini nýhugsandi og forvitin, og sært møguleikar heldur enn forðingar
- Tú hevur lætt við at taka avgerðir og skjótt við at umseta hugskot til veruleika
- Tú hevur gott yvirlit og samstundis tev fyri smálutum
- Tú hevur ein jaligan hugburð, góð samstarvsevni, dugir væl við kundum og ert førur fyri at geva arbeiðsfeløgunum íblástur
- Tú ert fleksibul, kanst arbeiða undir trýsti og ert sinnaður at leggja stóra orku í arbeiðið

**Vit bjóða tær**
Eitt avbjóðandi starv við beinleiðis tilvísing til stjórn og við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning á einari vinnulívsdeild í støðugari menning. Starvið verður sett sum skjótast, og lønin verður sett eftir avtalu í samsvari við royndir og førleika.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Bjarna Olsen, stjóra, á tlf. 548575, teldupostur: bjarni.olsen@eik.fo, Boga Bendtsen, undirstjóra og kredittleiðara, á tlf. 548520, teldupostur: bogi.bendtsen@eik.fo ella Elin Sigvardsen, starvsfólkaleiðara, á tlf. 548510, teldupostur: elin.sigvardsen@eik.fo.

**Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 7. januar 2010 og skulu stílast til:**

Eik Banki P/F
Att.: Elin Sigvardsen,
starvsfólkaleiðari
Yviri við Strond 2
100 Tórshavn

ella í teldupostí til
elin.sigvardsen@ eik.fo

**Les meira um starvið á**
www.eik.fo

## Tvey starvsfólk til Fíggjardeildina

Á Fíggjardeildini í Eik hava vit ábyrgdina av øllum fíggjarviðurskiftum í Eik-samtakinum, so sum fíggjarætlanum, roknskapum og Investor Relations.

Sum starvsfólk á Fíggjardeildini verður tú m.a. við til at gera roknskapir eftir IFRS-roknskaparreglum og øðrum altjóða reglum, ið eru galdandi fyri børsskrásettar fyirtøkur.

**Førleikar**
**Vit vænta, at tú**
- hevur royndir við fíggjarstýring, fíggjarætlanum og ger av roknskapum
- hevur viðkomandi útbúgving
- ert virkisfús/ur
- ert jalig/ur
- tekur ábyrgd
- ert liðleikari og ikki bangin fyri at deila vitan

**Vit ynskja okkum, men krevja ikki, at tú**
- hevur viðkomandi hægri útbúgving, t.d. cand.merc
- hevur innlit í viðkomandi lógir og reglugerðir
- dugir at samskifta munnliga og skrivliga á enskum
- hevur royndir frá líknandi størvum

**Vit bjóða tær**
Eitt fjølbroytt og avbjóðandi starv í eini børskrásettari fyritøku við virksemi í Føroyum og í Danmark. Ein krevjandi arbeiðsdag í tøttum samstarvi við dugnaligar og inspirerandi starvsfelagar við góðum møguleikum fyri fakligari og persónligari menning.

Størvini verða sett skjótast gjørligt, og verða lønt eftir avtalu í samsvar við royndir og førleikar tínar. Lesandi, sum eru um at verða liðug við útbúgvingina, eru vælkomin at søkja.
Fleiri upplýsingar um størvini eru at fáa frá Finn Danberg, fíggjarleiðara, á tel. 548610, teldupostur: finn.danberg@eik.fo ella Elin Sigvardsen, starvsfólkaleiðara, á tel. 548510, teldupostur: elin.sigvardsen@eik.fo

**Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 7. januar 2010 og skulu stílast til:**

Eik Banki P/F
Att.: Elin Sigvardsen,
starvsfólkaleiðari
Yviri við Strond 2
100 Tórshavn

ella í teldupostí til
elin.sigvardsen@ eik.fo

**Les meira um starvið á**
www.eik.fo

www.eik.fo